# Tilmæli
# um sernámfrøðiliga økið
# innan fólkaskúlaøkið

MENTAMÁLARÁÐIÐ 25. JUNI 2014

INNIHALD


# 1.0 FORMÆLIÐ 3

**1.1 Arbeiðstilgongdin 5**

**1.2 Inngangur 6**

**1.3 Tilmælið mælir til hesi átøk 7**

Skipan av sernámsfrøðiliga bygnaðinum Síða 7

Ábyrgdar- og uppgávubýtið 7

Sernámsfrøðilig tiltøk innan ta almennu skúlaskipanina og serflokkar og serskúla 7

Fíggjarligu avleiðingarnar av átøkunum 8

Kunngerðar- og lógarbroytingar 8

**1.4 Tilmæli viðv. dagstovnaøkinum 9**

# 2.0 SKIPAN AV SERNÁMSFRØÐILIGA BYGNAÐINUM 9

**2.1 Bygnaður 9**

2.1.2 Leiðslutoymi 11

2.1.3 Greiningartoymi 11

2.1.4 Samstarvstoymini 12

2.1.6 Dagstovnaøkið 12

# 3.0 ÁBYRGDAR- OG UPPGÁVUBÝTIÐ 14

**3.0 Sernám 14**

3.0.1 Bygnaður 14

3.0.2 Endamál 14

3.0.3 Arbeiðsuppgávur hjá toymunum á Sernámi 15

3.0.4 Tímajáttan 15

**3.1 Førleikastovurnar 16**

3.1.1 Bygnaður 16

3.1.2 Endamál 17

3.1.3 Innihald 17

3.1.4 Arbeiðsuppgávur í førleikastovuni 18

3.1.5 Samstarv við Sernám 18

4.0 SERNÁMSFRØÐILIG TILTØK INNAN TA ALMENNU SKÚLASKIPANINA OG SERFLOKKAR OG SERSKÚLA 21

4.1 Inklusjón 21

4.2 Flokking og lýsing av serundirvísing og sernámsfrøðiligum stuðli: 22

4.3 Serflokkar 23

4.3.2 Fráfaringarprógv 27

4.3.3 Serskúlin 27

5.0 FÍGGJARLIGU AVLEIÐINGARNAR AV ÁTØKUNUM 29

5.1 Gongdin í sernámsfrøðiligu játtanini og verandi játtan 29

5.2 Fíggjarligar avleiðingar av tilmælunum 30

6.0 KUNNGERÐAR OG LÓGARBROYTINGAR 32

6.1 Lógarheimildir 32

7.0 SAMANUMTØKA 34

8.0 KELDUR 35

9.0 FYLGISKJAL 37

Fylgiskjal 1 37

## 1.0 FORMÆLIÐ

Í november 2013 setti landsstýrismaðurin í mentamálum, Bjørn Kalsø, arbeiðsbólk at endurskoða tað sernámsfrøðiliga økið í fólkaskúlahøpi.

Hesin arbeiðsbólkur skuldi arbeiða samstundis og í ein ávísan mun "parallelt" við arbeiðsbólkin, sum skuldi endurskoða fólkaskúlabygnaðin. Hetta soleiðis, at tað sernámsfrøðiliga økið innihaldsliga og bygnaðarliga varð viðhugsað í endurskoðaða bygnaðin av fólkaskúlanum.

Arbeiðssetningurin hjá arbeiðsbólkinum tekur støði í fólkaskúlalógini § 4, stk. 5, har ásett er, at sernámsfrøðilig ráðgeving verður veitt skúlum, foreldrum og øðrum, ið varða av næmingum í fólkaskúlanum. Næmingar, ið hava tørv á serligum tiltøkum, ella sum ikki fáa nøktandi úrslit í vanliga undirvísingartilboði skúlans, fáa serundirvísing og/ella sernámsfrøðiligan stuðul. Virksemið hjá Sernámi, hjá tænastueindunum, førleikastovunum, serflokkum og serstovum er ætlað at røkka hesum ásetingum í fólkaskúlalógini. Harumframt virkar Skúlin á Trøðni eftir eini serstakari serskúlalóg, sum eisini er innanfyri fólkaskúlaøkið.

Høvuðsendamálið við arbeiðinum var at samskipa omanfyri nevnda sernámsfrøðiliga øki, soleiðis at samstarv og samskipan av tænastum og tilfeingi verður skipað betur, næmingunum at gagni.

Arbeiðssetningurin var, at arbeiðsbólkurin skuldi geva landsstýrismanninum eina tilráðing um:

1. Skipan av sernámsfrøðiliga bygnaðinum soleiðis, at næmingarnir fáa ta bestu skúlagongdina innanfyri givnar fíggjarkarmar.
2. Støðutakan til ábyrgdar- og uppgávubýtið og samskipan millum Sernám og tænastueindirnar (NSR), Førleikastovurnar og leiðslurnar.
3. Støðutakan til sernámsfrøðilig tiltøk innan ta almennu skúlaskipanina og til serstovur, serflokkar og serskúla-/r við atliti at:
    - Staðseting av sertilboðum
    - Innihaldi, skipan og bygnaði
    - Samskipan
    - Inklusjón
4. Lýsa fíggjarligu avleiðingarnar av tí, sum mælt verður til.
5. Hvørjar lógarbroytingar tilmælið viðførir.

Tey, ið manna arbeiðsbólkin, eru:

1. Frida Poulsen, fulltrúi, Mentamálaráðið
2. Joan Knudsen, lærari og cand.pæd.pæd.psyk., skrivari
3. Jenny Lydersen, undirvísingarleiðari, Mentamálaráðið
4. Emmy Joensen, stjóri, Sernám
5. Jan Christiansen, skúlastjóri, Skúlin á Trøðni
6. Durita Joensen, skúlastjóri, Runavíkar Kommunuskúli
7. Regin Marnersson, skúlastjóri, Skúlin á Giljanesi
8. Fríðbjørg Hammer, serlærari og avvarðandi at børnum við serligum tørvi
9. Herálvur Jacobsen, formaður, Føroya Lærarafelag

Frida Poulsen, forkvinna, Mentamálaráðið

Joan Knudsen, skrivari

Jenny Lydersen, Mentamálaráðið

Emmy Joensen, Sernám

Jan Christiansen, Skúlin á Trøðni

Durita Joensen, Runavíkar Kommunuskúli

Regin Marnersson, Sk. á Giljanesi

Fríðbjørg Hammer, Kollafjarðar skúli

Herálvur Jacobsen, Føroya Lærarafelag

**Tórshavn hin 24. juni 2014**

## 1.1 ARBEIÐSTILGONGDIN

Arbeiðsbólkurin fór til verka seinast í november mánaði, har arbeiðsskrá, fundartíðir og arbeiðssetningurin varð skipað. Arbeiðið hevur gingið væl við nógvum og drúgvum kjaki. Íalt hevur bólkurin havt 17 fundir og 2 arbeiðsdagar, har innihald, niðurstøður og tilmæli til átøk í hesum tilmæli eru blivin til. Nevndin hevur lagt seg eftir at hoyra sernámsfrøðiligu skipanirnar. Spurnarblað hevur verið sent øllum skúlaleiðslum/førleikastovum um teirra metan av sernámsfrøðiligu skipanini, vitjað hevur verið í serflokkum, skúlanum á Trøðni og sertilboðnum í Venjingarskúlanum, temadagur hevur verið skipaður á Sernámi, og hevur nevndin eisini kunnað seg um skipanir og kanningar av sernámsfrøðiliga virkseminum aðrastaðni.

Arbeiðsbólkurin er breitt samansettur og umboðar ymisk fak- og virkisøki og harvið eisini sjónarhorn, sum virka innan tað sernámsfrøðiliga økið. Tí hevur eisini verið arbeitt við at finna eitt felags stev og forstáilsi fyri, hvat hevur størsta týdning at fáa gjørt nakað við, og hvat er møguligt at fáa sett í verk. Nevndin hevur verið ógvuliga tilvitað og lagt áherðslu á ikki at koma við tilmælum, sum mann ikki metir kunnu setast í verk innan rímiliga tíð.

Sernámsfrøðiliga økið er eitt stórt økið, men arbeiðssetningurin var, at bólkurin skuldi koma við tilmæli viðvíkjandi sernámsfrøðiliga økinum í fólkaskúlahøpi, so tað er tann parturin arbeitt hevur verið við. Arbeiðsbólkurin hevur tó allatíðina verið tilvitaður um, at sernámsfrøðiliga skipanin umfatar nógv meira og annað enn fólkaskúlaøkið við tað, at bæði dagstovnaøkið og miðsnámsskúlaøkið eisini er ein partur av hesi skipan. Eisini eru tað aðrir stovnar og onnur ráð, sum arbeiða innan tað sernámsfrøðiliga økið. Eisini eiga kommunurnar ein stóran leiklut, við at tær rinda fyri høli, skrivara og skrivstovuhald í tænastueindunum. Hesir leikarar eru allir neyðugir, um vit skulu megna at lofta og hjálpa tí einstaka næminginum við serligum tørvi so tíðliga sum møguligt, so at fortreytirnar fyri menning og læring hjá tí einstaka vera so góðar sum møguligt. Tískil hevur arbeiðsbólkurin nomið við aðrar tættir innan sernámsfrøðiliga økið enn fólkaskúlaøkið, hóast ikki er farið í dýpdina innan hesi økini.

## 1.2 INNGANGUR

Sambært fólkaskúlalógini § 2[1] er álagt skúlunum at taka atlit at einstaka næminginum og at fremja, at næmingarnir nema sær kunnleika, fimi og arbeiðshættir og málbúnar, sum stuðla tí einstaka næminginum í fjølbroyttu, persónligu menningini.

Við støði í hesum er tað eisini innanfyri skúlans virksemi, at tann einstaki næmingurin skal fáa stuðul í menningar- og lærutilgongdini, og tað er her, at Sernám og førleikastovurnar verða grundleggjandi partur av stuðuls- og hjálparmøguleikunum hjá fólkaskúlanum at náa hesum endamáli fyri næmingar við serligum tørvi.

Lógarheimildirnar innan sernámsfrøðiliga øki[2] at virka eftir eru ásettar í fólkaskúlalógini[3]. Tó til brotini í fólkaskúlalógini, sum snúgva seg um sernámsfrøðilig tiltøk, vanta kunngerðir og leiðreglur í sambandi við sernámsfrøðilig tiltøk. Tilmæli um sernámsfrøðið er gjørt í 2001. Eitt annað tilmæli var gjørt, sum Fólkaskúlaráðið lat úr hondum í juni 2011, sum í høvuðsheitinum snýr seg um, hvussu serøkið í fólkaskúlanum eigur at vera skipað. Uppritið um Førleikastovur, sum í stóran mun bygdi á omanfyri nevnda tilmælið, var latið Mentamálaráðnum í apríl 2012 og sett í verk í fólkaskúlunum í august 2012. Við hesum hevur fólkaskúlin fingið ítøkilig amboð at skipa tað sernámsfrøðiliga økið, men enn vanta ítøkiligar kunngerðir og mannagongdir hvussu serliga samstarvið við tænastueindirnar[4] og Sernám eigur at vera skipað.

Ógreitt er, hvussu uppgávu- og ábyrgdarbýtið millum starvsfólkabólkar er og eigur at vera, t.d. millum lærarar, námsfrøðingar og stuðulsfólk annars. Arbeiðsbólkur var settur at viðgera setanarviðurskiftini hjá stuðlum, og arbeiðið og tilmælið frá hesum arbeiðsbólkinum eigur at vera nýtt í arbeiðnum, sum hetta tilmælið leggur upp til.

Tænastueindirnar við heitinum NSR vóru í samstarvi við kommunurnar fyribils settar á stovn í 2007, og eru nú 4 tænastueindir runt um í Føroyum. Tilmælið viðvíkjandi hesi fyriskipan verður viðgjørt í hesum tilmæli. Hóast tær hava virkað síðani 2007, er eingin formlig avtala gjørd millum land og kommunu.

Skúlin á Trøðni er heimilaður í lóg um serskúla, og henda skal endurskoðast og taka støðu til, hvønn leiklut skúlin skal hava í mun til Sernám og onnur sertilboð í fólkaskúlanum. Eisini er ynski um at endurskoða serlig undirvísingartilboð til næmingar, ið hava atferðar-, tilknýtis- og trivnaðartrupulleikar sambært § 45, stk. 4-6 í fólkaskúlalógini.

Arbeiðsbólkurin setti sær beinanvegin fyri, at hóast kveiking aðrastaðni frá, so skuldi tilmælið taka jørðild í føroyskum viðurskiftum og bert koma við tilmælum, sum mett vóru

---

[1] Fólkaskúlalógin http://www.logir.fo/foldb/llofo/1997/0000125.htm

[2] *Sernámsfrøði er heitið fyri sernámsfrøðiligt virksemi, sum verður sett inn fyri at forða fyri eini útihýsan av einstaklingum ella bólkum vegna teirra ymiskleika. Málið er at taka atlit at og beinleiðis brúka tann menniskjaliga ymiskleikan.*

[3] Fólkaskúlalógin § 4, stk 5 og 6 og § 12, stk. 2.

[4] Tænastueindirnar (NSR) eru royndarverkætlanir og byggja á tilmæli frá 8. feb. 2005 um royndarverkætlan í Eysturoynni.

kundu fremjast í verki innan rímiliga tíð. Arbeiðssetningurin, sum arbeiðsbólkurin fekk, segði, at arbeiðsbólkurin skuldi arbeiða innanfyri givnu fíggjarkarmar, men eisini lýsa fíggjarligu avleiðingarnar av tí, sum mælt verður til. Arbeiðsbólkurin hevur loyvt sær at koma við uppskoti um, um fíggjarkarmarnir loyva hesum, við átaki, sum hava øktar fíggjarligar avleiðingar. Tað átakið er ætlað sum ein økt játtan til sernámsfrøðiliga virksemið hjá skúlanum, tann sokallaða miðfirraða játtanin, sum skúlin sjálvur skipar. Eisini mælir bólkurin til, at føst játtan verður latin hvørjum serflokki umframt tímar vegna serligan tørv veittur frá Sernámi. Áherðsla skal tó leggjast á, at tað hevur stóran týdning, at tilmælið í síni heild hevur jørðild í tí, sum møguligt er at fremja, so átakið, sum krevur økta fígging, meira skal fatast sum, hvussu mælt verður til, at ein evt. økt fíggjarlig játtan innan økið eigur at vera raðfest.

Arbeiðið hevur tikið støðið í teimum 5 arbeiðssetningunum og er skipað í 5 pørtum, har tilmælini eru skipað undir hvørjum parti sær. Burturúr eru komið tilmælið um 29 átøk.

## 1.3 TILMÆLIÐ MÆLIR TIL HESI ÁTØK

| | |
|---|---|
| **SKIPAN AV SERNÁMSFRØÐILIGA BYGNAÐINUM** | **SÍÐA** |
| 1. Bygnarðarbroyting á Sernámi skipað í leiðslutoymi, greiningartoymi og samstarvstoymi. Samstarvstoymini eru umboðandi allar Føroyar eftir einum ávísum býtislykli | 10, 12 |
| 2. Umskipan av tænastueindunum til samstarvstoymi. Mælt verður til, at ein avtala verður formaliserað um núverandi samstarv, soleiðis at greitt fíggjarligt uppgávu- og ábyrgdarbýtið verður staðfest millum land og kommunu | 12 |
| 3. Serflokkar vera skipaðir undir leiðsluni í skúlunum | 26 |
| **ÁBYRGDAR- OG UPPGÁVUBÝTIÐ** | |
| 4. Seta eina tørvsgreiningarskipan/stigaskipan í verk | 11 |
| 5. Samstarvstoymini skulu vera tengd og knýtt at skúlavirkseminum | 12 |
| 6. Greitt ábyrgdarbýti millum arbeiðsuppgávur hjá Sernámi og førleikastovunum | 15, 18, 38 |
| 7. Talið av førleikastovum verður endurskoðað | 16 |
| 8. Skipa, allýsa og flokka sernámsfrøðiligan tørv | 22 |
| **SERNÁMSFRØÐILIG TILTØK INNAN TA ALMENNU SKÚLASKIPANINA OG SERFLOKKAR OG SERSKÚLA** | |
| 9. Skipa fakliga sterkar serflokkar, við fastari játtan. Hædd skal takast fyri landafrøðiligari staðseting og ávístum tørvi. Eisini skulu serflokkarnir lýsast neyvt | 23, 25 |
| 10. Raðfesta inklusjónshugtakið og gera tað møguligt at fremja, har tað letur seg gera, men eisini vera tilvitað um at gera dygdargóð skúlatilboð uttanfyri vanligu skúlaskipanina, har inklusjón í vanligu skipanina ikki verður mett at vera møgulig | 21 |
| 11. Seta ráðgevandi bólk í sambandi við nýggju próvtøkukunngerðina við atliti at serligari fyriskipan og fráfaringarprógvi fyri næmingar við serligum tørvi, sum ikki fara til próvtøku ella fara til próvtøku eftir serligari fyriskipan | 27 |

| | |
|---|---|
| 12. Endurskoða fíggingina til næmingar, sum eru yvir 18 ár og halda áfram í skúlaskipanini | 28 |
| **Fíggjarligu avleiðingarnar av átøkunum** | |
| 13. Hækka ta miðfirraðu játtanina | 15, 31 |
| 14. Ein partur av játtanini til serflokkar er tímajáttan til flokkin, og hin parturin kemur frá Sernámi | 25 |
| 15. Umskipan av deildarleiðarastørvunum í tænastueindunum | 11, 31 |
| 16. Manna samstarvstoymini eftir ávísum býtislykli, roknað út eftir næmingatali/barnatali í økinum | 12, 31 |
| 17. Endurskoða tænastur, sum í dag vera røktar av Sernámi, sum kunnu og/ella eiga at vera veittar frá øðrum stovnum/ráðum | 31 |
| **KUNNGERÐAR- OG LÓGARBROYTINGAR** | |
| 18. Sernámsfrøðiliga økið verður lýst í kunngerð, sbrt. fólkaskúlalógini § 4, stk. 5 og við kunngerðarheimild í § 4, stk. 7. | 2, 32 |
| 19. Ásetingarnar í grein 24 í ST-sátttmálanum um rættindi hjá teimum, sum bera brek verða lýstar og møguliga tiknar við í endurskoðanini av sernámsfrøðiliga økinum. | 21, 32 |
| 20. Førleikastovurnar verða lýstar í kunngerð. Kunngerðarheimild staðfestast í fólkaskúlalógina. | 20, 32 |
| 21. Vegleiðing til fólkaskúlalógina §12, stk. 2 verður gjørd, sum allýsir, hvat ein námsfrøðilig/sálarfrøðilig kanning skal innihalda | 32 |
| 22. Staðfest í lóg ella kunngerðarheimild í lógini, sum ásetir, at allir næmingar, sum fáa tímar vegna serligan tørv, skulu hava einstaklings læruætlan. | 33 |
| 23. Kanna um neyðugt er at endurskoða §13, stk. 5 í mun til § 45, stk. 6. | 33 |
| 24. §§ 26 og 27 í fólkaskúlalógini verða eftirkannaðar við atliti at skipan av sernámsfrøðiligum tiltøkum tvørturum kommunumark og avmarkingum og møguleikum at skipa fyri sertilboðnum. | 33 |
| 25. Endurskoða §28 í fólkaskúlalógini um heima- og sjúkraundirvísing | 31, 33 |
| 26. § 45, stk. 4 verður eftirkannað og møguliga umorðað og skoytt uppí til nærri ásetingar, tá ið næmingar skulu flyta tvørturum kommunumark | 33 |
| 27. Serflokkar verða allýstir og týðiligari orðaðir í fólkaskúlalógini við kunngerðarheimild, sum neyvt skal tilskila endamál, innihald, upptøkumannagongdir, hølisviðurskifti, krøv til stovnsetan av serflokki, atgongd til servitan o.a. | 23, 25, 33 |
| 28. Umorða § 45, stk. 6 soleiðis, at hon fatar um breiðari og annan serligan tørv enn tað, sum er tilskilað. Eisini verður mælt til kunngerðarheimild til hesa grein. | 33 |
| 29. Serskúlalógin eftirkannað, serliga við atliti at § 5, stk. 3 | 28 |

### 1.4 TILMÆLI VIÐV. DAGSTOVNAØKINUM

Í sambandi við ásetingina í § 5 í dagstovnalógini er tørvur á einum greiðari ábyrgdarbýti millum kommunurnar og landið. Mælt verður til, at ráðgeving í samband við § 5 umframt aðrar sernámsfrøðiligar uppgávur umframt tvímælt børn verða samskipaðar í samstarvstoymunum. Ein avtala um tænastur á dagstovnaøkinum, við heimild í fólkaskúlalógini, eigur at gerast við kommunurnar og Almannamálaráðið.

## 2.0 SKIPAN AV SERNÁMSFRØÐILIGA BYGNAÐINUM

### 2.1 BYGNAÐUR

Sum sæst á talvu 1, so er núverandi sernámsfrøðiligi bygnaðurin í mun til fólkaskúlaøkið skipaður í trimum grundsúlum undir Mentamálaráðnum. Hesar eru:

- Tann miðfirraða játtanin til miðfirrað sernámsfrøðilig tiltøk, sum vera skipað av førleikastovuni í skúlanum.
- Sernám, sum veitir tímar, greining, vegleiðing og ráðgeving til skúlan í mun til næmingar vegna serligan tørv
- Skúlin á Trøðni, sum virkar eftir eini serskúlalóg, og sum hevur sína egnu játtan.

Undir fólkaskúlanum eru førleikastovur, og í fleiri skúlum eru serflokkar, sum fáa tillutað eina játtan frá Sernámi, sum er oyramerkt til tann einstaka næmingin í serflokkinum. Við øðrum orðum er ongin ávís skipað ella føst normering til serflokkarnar. Tó undir Sernámi/MMR er eitt serskúlatilboð, sum tó liggur í einum skúla. Sernám er eisini skipað, sum nú er, við 4 tænastueindum, sum virka sum sjálvstøðugar eindir við deildarleiðara. Hesar eru skipaðar í samstarvi við kommunurnar. Trupulleikin við verandi bygnaði er, at bygnaðurin lutvíst er ógreiður, har ábyrgdar- og uppgávuøkið er ógreitt. Eisini vantar ein eins skipan av serflokkunum.




*Talva 1*

Mælt verður til, at sernámsfrøðiligi bygnaðurin verður sum víst í talvu 2. Mælt verður til, at umskipa yvirskipaða bygnaðin fyri sernámsfrøðiliga økið í fólkaskúlahøpi nakað. Tær tríggjar grundsúlurnar skulu framvegis vera, men serflokkar skulu ikki liggja undir leiðsluni á Sernámi, men vera undir leiðsluni á tí skúla/skúlaøki, serflokkurin er staðsettur.




*Talva 2*

Mælt verður til, at virksemið hjá Sernámi verður skipað í eina høvuðsdeild við einari leiðslu. Harumframt verður mælt til, at virksemið í tænastueindunum hjá Sernámi verður skipað í 5 samstarvstoymi: 1. Norður oyggjar, 2. Eystur og Sundalagið, 3. Tórshavnar kommuna og Sandoy, 4. Vestur (Vágar, Vestamanna og Kvívík) og 5. Suðuroyggin. Til hesar eindir verða skúlarnir/ førleikastovurnar, serflokkar og Skúlin á Trøðni knýtt at. Næmingagrundarlagið undir samstarvstoymunum er nakað ójavnt, men hetta er gjørt útfrá landafrøðiligum økjum.

Tað nýggja í hesum uppskotið er, at verandi tænastueindir verða umskipaðar til samstarvstoymi undir leiðslu av Sernámi, har allir skúlar í Føroyum vera knýttir at samstarvstoymunum. Hetta uppskotið viðførir, at deildarleiðarastørvini í núverandi líki verða niðurløgd/umskipað. Tænastueindirnar sum eru, eru samskipaðar við kommununa á staðnum, og mælir arbeiðsbólkurin til, at skipanin kemur í fasta legu, tó ikki sum sjálvstøðugar eindir við deildarleiðarum, men undir beinleiðis leiðslu av Sernámi. Arbeiðsbólkurin mælir til, at støðug avtala verður gjørd við kommunurnar. Um Tórshavnar kommuna og Sandoy við atliti at samstarvstoymunum verður skipað í trý øki, so verður mælt til, at staðsetingin verður á einum staði. Har samstarvsavtala ikki er við kommunurnar t.d. sum í Vesturøkinum, og har ynski ikki er at gera slíka avtalu, m.a. um høli, skrivstovuútgerð o.a., verður mælt til, at samstarvstoymið verður staðsett í skúlunum í økinum, við arbeiðstíð á teimum ymsu skúlunum við tilmælta býtislykli.

### 2.1.2 LEIÐSLUTOYMI

Mælt verður til, at leiðslan á Sernámi verður umskipað við stjóra og varastjóra, sum saman við fyristitingini myndar leiðslutoymið. Arbeiðið í greiningartoymunum og samstarvstoymunum er undir leiðslu og ábyrgd av leiðsluni í Sernámi.

### 2.1.3 GREININGARTOYMI

Mælt verður til, at greiningar- og kanningararbeiðið verður skipað í eitt greiningartoymi.

Greiningartoymið skal m.a. hava til uppgávu at gera eygleiðingar, sálarfrøðiligar kanningar, sansa- og rørslu kanningar, hoyrikanningar og sjónkanningar. Arbeiðið í greiningartoyminum skal samskipast við greiningararbeiðið í heilsuverkinum undir Psykiatriska Deplinum og Almannaverkinum. Greiningartoymið skal hava ábyrgdina av orðblinda-/lesikanningum, men førleikastovan kann gera hesar.

Mælt verður til at seta eina skipan av eini tørvsgreining í verk, ið er grundað á virkisføri og búningarstøði hjá næminginum, har atlit verður tikið at fakligum, persónligum og sosialum førleikum[5], so til ber at allýsa og flokka tørvin á sernámsfrøðiligum stuðli. Mælt verður til, at

[5] metingin má grundast í eini meting av virkisførleikanum hjá tí enstaka næminginum til tess at tryggja javnbjóðis møguleikar at taka lut í undirvísingini og floksfelagsskapinum.

arbeiðið at tilevna eina slíka stiga-skipan verður gjørt, so at mann fær flokkað teir ymisku tørvirnar og útfrá tí kunna tilluta tímar o.a.

### 2.1.4 SAMSTARVSTOYMINI

Við støði í aftursvari frá skúlunum/førleikastovunum[6] um væntanir til tænastur frá Sernámi, og við støði í kanningum gjørdar aðrastaðni av skipanum at líkna við Sernám,[7] verður mælt til, at sernámsfrøðiliga skipanin arbeiðir tættari skúlunum.

Mælt verður til, at arbeiðið í samstarvstoymunum leggur størri dent á ráðgeving og miðfirraða arbeiði úti í skúlunum og stovnunum og minni dent á kanning og greining. Mælt verður til, at tætt samstarv verður millum greiningar- og samstarvstoymini, og at uppfylgingararbeiðið verður úti í økjunum. Dentur eigur at leggjast á at arbeiða meira við supervisjón og fasilitering, vitanardeiling og førleikamenning. Sernám skal arbeiða við og í námsfrøðiliga umhvørvinum í skúlunum við atliti at dygdarmenna, fjølltátta og tillaga innihaldið í undirvísingartilboðnum til næmingar, ið hava tørv á sernámsfrøðiligum stuðli ella serundirvísing.

Fyri at skipa arbeiðið í samstarvstoymunum og at tryggja javnbjóðis tænastur til allar fólkaskúlar, verður ein vegleiðandi býtislykil gjørdur innan øll fakøkini í samstarvstoymunum, sum ásetir, hvussu nógvar tímar skúlin fær tryggjað at hava samstarvstoymið í skúlanum. Býtislykilin eigur at taka hædd fyri næminga-/barnatalinum í økinum, um økið hevur serflokk og um onnur serlig viðurskifti gera seg galdandi. Sami býtislykil kundi verið fyri øll starvsfólkini í samstarvstoyminum. Fakøkini í samstarvstoyminum eru: sálarfrøðingur, námsfrøðiligur- og sálarfrøðiligur ráðgevi og taliráðgevi[8]. Miðað eigur at vera eftir, at námsfrøðiligi ráðgevin í samstarvstoyminum – ið skal ráðgeva skúlunum – eigur at hava lærarafútbúgving við hægri ískoytisútbúgving.

Ein uppraðfesting av samstarvstoymunum bæði í játtan og víðkan av økjum t.d. í Vesturøkinum og Sandoynni krevur, at mann annaðhvørt javnar samansetingina út í teimum ymsu samstarvstoymunum kring landið, har skipanir eru, soleiðis at starvsfólkaorkan verður regulerað eftir uppskotna býtislykli, ella at ein økt játtan verður raðfest til samstarvstoymini.

### 2.1.6 DAGSTOVNAØKIÐ

Heimildin fyri at veita sernámfrøðiliga tænastu til børn undir skúlaaldur er ásett í fólkaskúlalógini. Virksemið hjá Sernámi til bólkin undir skúlaaldur er støðugt vaksin seinastu árini.

---

[6] Bólkurin sendi spurnarblað út til 47 fólkaskúlar og 3 fRískúlar, og inn komu 40 svar.

[7] Implement consoulting group (2013). Pejlemærker for fremtidens pædagogisk-psykologiske rådgivning. KL

[8] Taliráðgevi skal eisini taka sær av talu- og samskiftisvenjingum.

Sum talvan vísir niðanfyri, so vóru í 2013 153 nýggjar tilmeldingar til Sernám frá dagstovnaøkinum, sum vóru 10 tilmeldingar fleiri enn árið fyri. Talið av nýggjum tilmeldingum frá fólkaskúlaøkinum var 122 í 2013, sum var 1 minni enn árið fyri. Tilsamans vóru 275 nýggjar tilmeldingar til Sernám í 2013 í mun til 266 árið fyri, av teimum vóru 56% frá dagstovnaøkinum.




*Talva 3*

Í sambandi við ásetingina í § 5 í dagstovnalógini er tørvur á einum greiðari ábyrgdarbýtið millum kommununar og landið. Mælt verður til, at ráðgeving í sambandi við § 5 umframt aðrar sernámsfrøðiligar uppgávur verða samskipaðar í samstarvstoymunum. Ein avtala um tænastur á dagstovnaøkinum, við heimild í fólkaskúlalógini, eigur at gerast við kommunurnar og Almannamálaráðið. Hóast Mentamálaráðið umsitur dagstovnalógina, sum eisini umrøðir sernámsfrøði á dagstovnaøkinum[9], so eru tað kommunurnar, sum umsita tann fíggjarliga partin av tí sernámsfrøðiliga stuðlinum.

[9] Løgtingslóg nr. 67 frá 10. mai 2000 um dagstovnar og dagrøkt (broytt 9. mai 2006) § 5., *Stk. 2, 3.*

## 3.0 ÁBYRGDAR- OG UPPGÁVUBÝTIÐ

## 3.0 SERNÁM

### 3.0.1 BYGNAÐUR

Sum nevnt í parti 1.0 mælir arbeiðsbólkurin til eina bygnaðarbroyting á Sernámi. Hetta fyri at miðsavna og styrkja um leiðsluna og fyrisitingina, miðsavna greiningina, og at tað verður møguligt, at  samstarvstoymini arbeiða tættari at skúlunum.




*Talva 3*

### 3.0.2 ENDAMÁL

Endamálið hjá Sernámi er at veita  skúlum og dagstovnum, foreldrum og øðrum, ið varða av børnum og ungum í aldrinum 0-18 ár,  sernámsfrøðiliga vegleiðing og ráðgeving.  Endamálið hjá Sernámi er at veita vegleiðing og ráðgeving í sambandi við innihaldið í stuðulsátøkum til børn og ung við serligum tørvi ella sum ikki fáa nøktandi úrslit í vanliga undirvísingartilboði skúlans og sum ikki kunnu fylgja ársætlanini hjá flokkinum. Endamálið hjá Sernámi er at gera eina námsfrøðiliga og sálarfrøðiliga meting, sum hevur til endamáls at lýsa tann fakliga, persónliga ella sosiala trupulleikan hjá næminginum ella í læruhøpinum. Hetta við atliti at veita skúlanum, næminginum og avvarðandi ráðgeving í mun til møguleikar at taka hond um trupulleikan.

Sernám skal veita ráðgeving og vegleiðing til serflokkar, sum m.a. vera settir á stovn[10] fyri næmingar, ið ikki á annan hátt kunnu fáa nøktandi undirvísing í fólkaskúlanum. Næmingur kann bert vera fluttur í serflokk í samráð við og eftir tilmæli frá Sernámi og í samráð við foreldur/avarðandi.

[10] Fólkaskúlalógin §45 stk. 6. 1) Landsstýrismanninum verður heimilað at seta á stovn serligan skúla ella undirvísingartilboð fyri næmingar við atferðar-, tilknýtis- og trivnaðartrupulleikum, ið ikki á annan hátt kunnu fáa nøktandi undirvísing í fólkaskúlanum.

### 3.0.3 ARBEIÐSUPPGÁVUR HJÁ TOYMUNUM Á SERNÁMI

| Leiðslutoymið | Greiningartoymið | Samstarvstoymið |
|---|---|---|
| **Staðseting: Sernám**<br>• Umsita tímapuljuna og samskipa viðgerðina av tímabýtinum<br>• Fyrisiting, journal, KT v.m. lønaravgreiða í sambandi við sernámsfrøðiligar stuðlar<br>• Bókhald, skrivarauppgávur<br>• Føra hagtøl<br>• Gera tilmæli til ein part av heima- og sjúkraumsóknum<br>• Umsita samstarv og tryggja “brúgvarnar “ millum dagstovn, skúla, miðnám ella annað virksemi eftir fólkaskúlan | **Staðseting: Sernám**<br>• Tørvsgreiningar<br>• Sálarfrøðiligar kanningar<br>• Taluviðgerð<br>• Rørslu- og sansaskipanar-kanningar, ráðgeving og uppfylging<br>• Hoyrikanningar, ráðgeving, uppfylging og undirvísing av næmingum við CI og øðrum hoyribrekum<br>• IKT, kanning, ráðgeving og uppfylging til alternativt sam-skifti<br>• umsita lesi- /orðblindakanning, vegleiðing og uppfylging | **Staðseting: Í økinum**<br>• Sernámsfrøðilig ráðgeving<br>• Supervisjón<br>• Uppfylging<br>• Samskipa serligan tørv<br>• Vera við til at menna læruumhvørvið<br>• Ráðgeva skúlaleiðsluni, lærarum og foreldrum<br>• Neyvt samstarv við førleikastovuna<br>• Einstaklingsætlanir, tillaging, lýsing, íverksetan og uppfylging<br>• Stuðla arbeiðnum hjá førleika-stovunum/ flokstoymunum at skipa undirvísingina fyri børn við serligum tørvi<br>• Uppfylging av niðurstøðum í sálarfrøðiligum kanningum, eygleiðingum, førleikakanningum, lesikanningum, orð-blindakanningum v.m. í tøttum samstarvi við førleikastovuna<br>• Í samstarvi við førleikastovurnar hava regluligar eftirmetingar av úrtøkuni hjá einstaka næminginum, sum hevur serligan tørv |

### 3.0.4 TÍMAJÁTTAN

Til tess at tryggja størri kontinuitet og støðufesti til næmingar,  ið hava tørv á serligum fyriskipanum, verður  mælt til, at játtanin til miðfirraðu tímarnar verður økt, samstundis sum ein allýsing verður gjørd, á hvønn hátt øktu miðfirraðu tímarnir skulu nýtast til sernámsfrøðilig stuðulsátøk. Hesir tímar skulu nýtast til eykahjálp í einstøkum lærugreinum til næmingar ella næmingabólkar, sum hava ilt við at fylgja við vanligu undirvísingini í lærugreinini. Talan kann vera um tímar til einstaklingar, bólkar, lesi/rokniskeið, SI, faklig átøk og og námsfrøðilig átøk innan trivnað.

Sambært fólkaskúlalógini §12 stk. 2 [11] skal játtan til tímar til serundirvísing og sernámsfrøðiligan stuðul grundast á eina námsfrøðiliga/sálarfrøðiliga kanning. Kanningin eigur at vera fakliga grundað við atliti at virkisføri og búningarstøði hjá næminginum. Hugsað verður her um bæði fakligir, persónligir og sosialir førleikar til tess at tryggja javnbjóðis møguleikar at taka lut í undirvísingini og floksfelagsskapinum. Um greiningarskipanin, sum bólkurin vísur á aðrastaðni í tilmælinum, verður sett í verk, so er hetta arbeiðið ein partur av tí arbeiðinum.

Tað eigur at vera greiður skilnaður millum tímar játtaðar vegna serligan tørv og miðfirraðu tímarnar. Sernám ræður yvir tímunum vegna serligan tørv, ætlaðir ávísum næmingum, meðan skúlin hevur ábyrgd av miðfirraðu tímunum í samstarvi við Sernám. Henda broyting, við eini øktari miðfirraðari játtan, eigur at minka um trýstið á Sernám, og samstundis fær skúlin/førleikastovurnar ábyrgd av at tryggja innihaldið í miðfirraðu (ser)-undirvísingini. Henda broyting hevur við sær, at tað bert eru næmingar, sum sambært § 12 stk. 2 kunnu fáa játtaðar tímar vegna serligan tørv frá Sernámi. Frymilin til tímar vegna serligan tørv játtaðir eftir § 12 í fólkaskúlalógini er, at sernámsfrøðiligi stuðulin verður givin til næmingar, sum hava sernámsfrøðiligan tørv, sum ikki er fyribils.

## 3.1 FØRLEIKASTOVURNAR

### 3.1.1 BYGNAÐUR

Arbeiðsbólkurin hevur ikki spurt leiðslurnar ella limir í førleikastovuni um teirra hugburð til arbeiði. Hetta er m.a. tí, at tað júst varð gjørt í TALIS-kanningini í 2013 [12], har Fólkaskúlaráðið fekk ískoytisspurningar um førleikastovur við í kanningina. Hóast lutfalsliga fá svaraðu kanningini, so var niðurstøðan hjá Fólkaskúlaráðnum, at hóast førleikastovurnar bert hava 2 ár á baki, so sær út til, at skipanin sum heild virkar væl í flestu økjum.

Um nýggjur fólkaskúlabygnaðurin verður framdur við størri skúlaeindum, so verður mælt til at minka talið av førleikastovum kring landið. Mett verður, at hetta kann gera skipanina meira virkisføra. Teir smærru skúlarnir fáa allir atgongd til eina førleikastovu í teimum størru skúlaeindunum. Teir skúlar, ið hava serkunnleikan á staðnum, manna egnu førleikastovu. Skúlar, ið hava partvís serkunnleika á staðnum, fáa írestandi førleika frá førleikastovuni í økinum.

[11] §12, stk. 2 Serundirvísing og sernámsfrøðiligur stuðul, sbrt. §4, stk. 4, ið ikki er fyribils, skal verða grundað á eina námsfrøðiliga/sálarfrøðiliga kanning og skal fara fram í samráð við næmingin og foreldrini. Um foreldrini nokta fyri hesum, skal skúlin kunna barnaverndina um avgerðina hjá foreldrunum.

[12] *Ískoytisspurningar til TALIS-kanningina* – spurningar, sum Fólkaskúlaráðið setti um førleikastovur. Februar 2014

### 3.1.2 ENDAMÁL

Førleikastovan skal menna skúlans arbeiði sum heild, fylgja næmingum og flokkum, har stórar avbjóðingar eru, seta í verk fyribyrgjandi átøk og veita næmingum, sum hava ilt við at fóta sær, skjóta hjálp bæði fakliga og sosialt, so at tørvurin á serundirvísing minkar. Arbeiðið í førleikastovuni fevnir um tvær súlur, tað almenna/vanliga námsfrøðiliga øki og tað sernámsfrøðiliga øki. Tað merkir, at førleikastovan skal hava ein virknan leiklut at menna og styrkja tað fakliga og sosiala arbeiðið í skúlunum, samstundis sum førleikastovan saman við leiðslu skúlans hevur ábyrgd av miðfirraðu serundirvísingini, og at serligur tørvur verða fyriskipaður og lagaður til ávísa tørvin bæði hjá næmingum og flokkum. Eisini skal førleikastovan samskifta, samskipa og samstarva við samstarvstoymini hjá Sernámi viðvíkjandi næmingum við serligum tørvi[13].

Førleikastovan er skúlans innanhýsis vitanarmiðdepil. Samrøðan millum ymsu fakbólkarnar er av sera stórum týdningi, tí hon verður mett at smitta gagnliga av, so vit fáa samvirkandi fyrimunir. Samspælið millum førleikastovuna og restina av skúlanum fevnir um ráðgeving og hugskotsgeving til einstaka læraratoymið, einstaka læraran ella stuðulin í teirra námsfrøðiliga arbeiði við ymsu tørvunum hjá næmingunum. Eisini skal førleikastovan veita lærarum hjálp og ráðgeving umframt at samskipa og menna náms- og fakligu førleikarnar í skúlanum.

Førleikastovan eigur at leggja áherðslu á, at støðið verður tikið í førleikunum hjá næmingunum og menningarmøguleikum teirra. Í virkseminum hjá førleikastovuni eigur læra at verða hugsað breitt, har yvirskipaða uppgávan fevnir um javnt og samt at bera saman allar næmingar í mun til háttin, sum valdur er at innrætta og skipa undirvísingina á staðnum. Førleikastovan skal - samstundis sum hon er ein praktisk fyriskipan - vera eitt grundanarrúm, har samlaða skúlaskipanin á staðnum hugsar inn tørvin hjá øllum næmingunum. Málið hjá førleikastovuni er tí bæði ein hóskandi skipan av virkseminum í skúlaøkinum í mun til á bestan hátt at rúma øllum næmingum og at tryggja, at næmingar við serligum tørvi fáa eitt viðkomandi og skikkað undirvísingartilboð[14].

### 3.1.3 INNIHALD

Arbeiði í førleikastovuni fatar um at virka fyri heildarmenning skúlans og at tryggja, at arbeiðið í førleikastovuni fevnir um báðar grundsúlurnar, vanligu undirvísingina og tað sernámsfrøðiliga økið. Fyri betur at kunna røkta báðar arbeiðssetningarnar, mælir bólkurin til, at fakfólkini í førleikastovuni raðfesta arbeiðsbýti javnt millum báðar súlurnar.

---

[13] Mentamálaráðið (2011). *Tilmælið um sernámsfrøði.*

[14] Fólkaskúlaráðið (2012). *Upprit um førleikastovur - grundað á tilmælið um serundirvísing*

### 3.1.4 ARBEIÐSUPPGÁVUR Í FØRLEIKASTOVUNI

Førleikastovan eigur at leggja dentin á, at støðið verður tikið í førleikunum hjá næmingunum og menningarmøguleikum teirra. Virksemið í førleikastovuni er millum annað tilskilað í uppriti[15].

**Førleikastovan**

- Er undir leiðslu skúlans
- Samskipa tímar og innihald vegna serligan tørv og miðfirrað serundirvísing
- Menna undirvísingarhættir
- Faklig upplegg, foreldrafundum og námsfrøðiligum fundum
- Gera lesi/roknikanningar
- Tryggja, at einstaklingslæruætlanir verða gjørdar fyri næmingar við serligum tørvi
- Næmingalaga, ráðgeva og eftirmeta í mun til innihaldið í læru- og menningartilgongdini hjá næmingum við serligum tørvi m.a. viðvíkjandi ársætlan og einstaklings læruætlan
- Ráðgeva og veita hjálp viðvíkjandi inklusjón
- Tilfar evt. tillaga tilfar
- Einstaklings fakligar royndir
- Menna námsfrøðiliga umhvørvi í skúlunum at kunna og samskifta við foreldur

### 3.1.5 SAMSTARV VIÐ SERNÁM

Førleikastovan skal í samstarvi við samstarvstoymið hjá Sernámi verða við til at hjálpa lærarum at tryggja, at vanliga serundirvísingin og sernámsfrøðiligur stuðul vegna serligan tørv er á einum fakligum, námsfrøðiligum støði, so at allir næmingar fáa tær avbjóðingar, teimum tørvar. Í dagliga arbeiðinum í skúlunum er umráðandi, at hjálp og ráðgeving er tøk og verður veitt so skjótt tilber. Tað er umráðandi, at førleikastovan saman við samstarvstoyminum hevur møguleika at hjálpa og ráðgeva lærarunum, tá ið teir skulu velja arbeiðshátt og arbeiðstilfar til næmingarnar við serligum avbjóðingum.

[15] Fólkaskúlaráðið (2012). *Upprit um førleikastovur - grundað á tilmælið um serundirvísing*

Í sambandi við sernámsfrøðiliga økið er leikluturin hjá førleikastovuni at hjálpa lærarum í flokkunum at fyribyrgja, at trupulleikarnir sleppa at vaksa. Har, sum álvarsligir trupulleikar eru, skal Sernám gera neyðugu útgreiningarnar sum krevjast, meðan førleikastovan hevur leiklutin sum samskipari, vegleiðari og undirvísari, so allar góðar kreftir í skúlanum leggja orku í, at næmingurin fær góðan stuðul og hjálp at megna avbjóðingar sínar.

Førleikastovan á staðnum og samstarvið við Sernám er ein fortreyt fyri væleydnaðari inklusjón. M.a. tí at henda tilgongd  krevur, at lærarar og námsfrøðiligir stuðlar hava eitt stað at venda sær til, har vitan verður uppbygd. Hesa uppgávu í tøttum samstarvi við samstarvstoymið verður mett, at førleikastovan kann røkja, m.a. tí at umvegis førleikastovuna kann verandi vitan verða gagnnýtt at menna gott læruumhvørvi og námsfrøðilig amboð.

Ein av niðurstøðunum, sum bólkurin kom fram til við støði í afturbering frá skúlans leiðslu/førleikastovum, serflokkum og Sernámi var, at fleiri teirra eftirlýstu eina greiðari lýsing av uppgávubýtinum millum partarnar. Bólkurin hevur lagt upp til omanfyri nevnda uppgávubýtið.




*Talva 4*

Eitt av tilmælunum, sum bólkurin er komin fram til, er stovnsetanin av samstarvstoymunum, við tí fyri eyga at kunna fáa eitt tættari samstarv millum skúlarnar og Sernám í lag. Sum omanfyri standandi talva vísir, so eru uppgávur, sum kunnu loysast av fleiri pørtum. Talvan niðanfyri vísir uppgávur, sum førleikastovan og samstarvstoymini í felag vara av. Arbeiðsuppgávurnar hjá ávikavíst leiðslu-, greiningar- og samstarvstoymi og førleikastovuni er tilskilað í eini felags talvu í fylgiskjali 1.

**Førleikastovan/Samstarvstoymið**

- Einstaklinga fakligar royndir t.d. rokni/lesikanningar
- Sparra og ráðgeva í tilgongdum hjá lærarum
- Skipað arbeiðs- og mannagongdir
- Ráðgeva og vegleiða lærarum og foreldrum
- Stuðla arbeiðnum at skipa undirvísingina fyri næmingar við serligum tørvi
- Uppfylging av niðurstøðum í sálar-frøðiligum kanningum, eygleiðingum, førleikakanningum, lesikanningum, orðablindakanningum v.m. í tøttum samstarvi við avvarðandi fakfólk

Førleikastovan er eitt tvørfakligt toymi. Tað verður mett, at rætt er, at í toyminum eru: umboð fyri leiðslu skúlans, serlærari, lesivegleiðari, støddfrøðilærari, AKT-lærari og orðblindalærari. Aðrir bólkar, sum eru knýttir at førleikastovunum eru: SSP- lærari, skúlavegleiðari, skúlabókavørður, KT- vørður, flokslærarar, cand. pæd. pæd. psyk., heilsusystir og onnur[16].

Neyðugt er í hesum sambandi at allýsa arbeiðs- og ábyrgdarøkið hjá hvørjum fakbólki fyri at tryggja, at uppgávurnar hjá førleikastovuni verða greiðari og lættari at umsita (sí skjal 1).

Niðurstøðan í ískoytisskanningini hjá Fólkaskúlaráðnum[17] er, at tey eisini mæla til at fremja fleiri átøk fyri at røkka málunum við førleikastovunum. M.a. verður mælt til, at arbeiðsøkini hjá starvsfólkunum í førleikastovuni verða lýst, og at almanna- og serøkið verða allýst.

Hesum er hesin arbeiðsbólkurin eisini samdur í, og mælt verður tí til, at arbeiðsøki, uppgávur og heimildir hjá førleikastovuni verða lýstar í kunngerð sum skjótast.

[16] Fólkaskúlaráðið (2012). *Upprit um førleikastovur - grundað á tilmælið um serundirvísing*

[17] *Ìskoytisspurningar til TALIS-kanningina* – spurningar, sum fólkaskúlaráðið setti um førleikastovur. Februar 2014

# 4.0 SERNÁMSFRØÐILIG TILTØK INNAN TA ALMENNU SKÚLASKIPANINA OG SERFLOKKAR OG SERSKÚLA

## 4.1 INKLUSJÓN

Tá ið talan er um sernámsfrøði bæði innan ta vanligu skipanina, men eisini innan serflokkar og serskúla, hevur tað týdning eisini at fyrihalda seg til inklusjónshugtakið. Í tráð við grein 24 í ST-sáttmálanum [18] um rættindi hjá teimum, sum bera brek, sum Føroyar í 2009 hava undirskrivað, hava øll óansæð førleikar rætt til skúlatilboð. Sambært hesi grein um útbúgving verður m.a. ásett, at tryggjast skal ein inkluderandi útbúgvingarskipan, og at fólk, ið bera brek, ikki skulu verða útihýst úr vanligu útbúgvingarskipanini[19]

Viðvíkjandi at hava ein almennan skúla fyri øll, eru Føroyar í eini serstøðu við tað, at vit ikki skulu flyta næmingar úr serskiltum tilboðum til vanligar flokkar í tí almennu skipanini. Føroysk siðvenja hevur verið ikki at havt sertilboð/serskúla í stóran mun[20], so tá ið vit viðgera inklusjónshugtakið í føroyskum høpi, snýr tað seg meira um, hvussu vit fáa tryggjað góða góðsku í teimum undirvísingartilboðum, sum eru.

Sambært fólkaskúlalógini hava øll børn tryggjað rættindi til tann almenna fólkaskúlan ella aðra undirvísing, ið kann javnmetast við tað, sum vanliga verður kravd í fólkaskúlanum. Somuleiðis er tryggjað børnum undirvísing í nærumhvørvinum[21], men miðað eigur samstundis eftir at skapa best møguligu umstøður til allar næmingar, eisini børn, sum á ein hvønn hátt hava ein serligan tørv. Í hesum sambandi verður mælt til, at ískoyti verður gjørt til § 13, stk. 6, soleiðis at heimild eisini verður at gera frávik í mun til stk. 5 í somu grein, so at næmingar, ið hava tørv á tí, kunnu vera undirvístir meira enn helvtina av undirvísingini uttanfyri vanligu skipanina. Mælt verður til hetta, tí hóast ymsar fyriskipanir, so eru tað næmingar, sum partar av skúlatíðini hava tørv á so serligari hjálp, at inklusjón bara er møgulig í ávísan mun.

Arbeiðsbólkurin mælir til inklusjón í allar størsta mun, har tað ber til, men saman við inklusjónshugtakinum má eisini verða hugsað um vanliga flokkin og um læraran í vanliga flokkinum, og at hesin verður førleikamentur. Ein fakliga sterk førleikastova í skúlunum, vælskipað og møgulig økt miðfirrað játtan til skúlan og felags jaligur hugburður til inklusjón er við til at skapa góðar fortreytir fyri væleydnaðari inklusjón. Ráðgeving og vegleiðing frá Sernámi innan hetta økið hevur eisini stóran týdning.

Arbeiðsbólkurin metir, at tað hevur stóran týdning at vera tilvitaður um, at neyðugt er við sertilboðum, og at tørvur er á teimum. Tó hevur tað týdning, at funnið verður fram til ein felags bygnað fyri sertilboðini, so at mann fær fjølbroytni í tey ymisku tilboðini, og at tey verða

[18] Sí § 24 í ST-sáttmálanum um rættindi teirra, ið bera brek

[19] Í tráð við allýsingar av inklusjónhugtakinum, so snýr tað seg ikki bara um at vera partur av felagsskapinum, men eisini at eiga virknan lut har. Inklusjónshugtakið snýr seg eisini um mentan, hugburð, mannasyni og virði, so treytin fyri væleydnaðari inklusjón er eisini, at starvsfólkini hava felags hugburð til inklusjón, eru motiverað at inkludera, fáa neyðuga fakliga førleikan at taka sær av uppgávuni,og at nøktandi normering verður sett til uppgávuna.

[20] Sí tøl yvir næmingar, sum ganga í serskiltum tilboðum á s. 25

staðsett ymsa staðni í landinum. Mælt verður til, at gjørdur verður ein yvirskipaður bygnaður av serflokkum, sum eisini í ávísan mun kann vera knýttur at serskúlanum, Um serflokkurin er knýttur at serskúlanum hevur tað týdning, at endamál, skipan og ábyrgd eru nágreiniliga lýst. Eisini hevur tað týdning, at felags mannagongdir og leiðreglur eru t.d. viðv. játtan, sernámsfrøðiliga ráðgeving og supervisjón, leiðsluviðurskifti, upptøkumannagongdir, stødd o.a.

## 4.2 FLOKKING OG LÝSING AV SERUNDIRVÍSING OG SERNÁMSFRØÐILIGUM STUÐLI:

| **Slag av serundirvísing** | **Lýsing** |
|---|---|
| Sernámsfrøðilig átøk | Verða skipað eftir miðfirraðu tímajáttanini. Átøkini vera skipað í bólkum partar av skúlatíðini. Kunnu vera inni í flokkinum, men eisini uttanfyri floksundirvísingina í bólkum. |
| Vanlig serundirvísing | Serundirvísing, sum liggur uttanfyri vanligu undirvísingina. Kann fara av miðfirraðu tímajáttanini. |
| Einstaklings serundirvísing ella sernámsfrøðiligur stuðul | Tímar vegna serligan tørv játtaðir eftir §12 í fólkaskúlalógini. Hesin sernámsfrøðiligi stuðulin verður givin til næmingar, sum hava sernámsfrøðiligan tørv, sum ikki er fyribils. Hesin stuðul verður veittur meira sum einstaklings sernámsfrøðiligur stuðul. |
| Serflokkar | Serflokkar umfata serligar skipanir í tí vanliga fólkaskúlanum, har givið verður serundirvísing og sernámsfrøðiligur stuðul. Serflokkar eru undir leiðsluni í tí skúla ella skúlaeind, har flokkurin ella deildin er staðsett. Fyri at kunna vera ein serdeild ella serflokkur, mugu minst 4 næmingar vera savnaðir. |
| Serskúli | Serskúli liggur uttanfyri vanliga fólkaskúlan og er skipaður eftir serstakari lóg. Serskúlin er fyri alt landið. Serskúlin hevur sína egnu leiðslu. |

## 4.3 SERFLOKKAR

Verandi bygnaður sær soleiðis út:




*Talva 5*

Við í talvuni eru bert teir størstu og/ella stovnsettu serflokkar. Í talvuni niðanfyri er yvirlit yvir tal av næmingum, sum ganga í teimum størstu serflokkunum og í serskúla skúlaárið 2013/2014. Talan er um 50 næmingar í Skúlanum á Trøðni, 10 næmingar í skúlanum við Ósánna, 11 næmingar í Hoyvíkar skúla, 20 næmingar á Venjingarskúlanum og 13 næmingar í skúlanum við Løkin. Tilsaman 104 næmingar. Skoytast skal uppí, at fleiri serskild skúlatilboð eru á fleiri øðrum skúlum, men hesi eru antin ógvuliga lítil ella/og hava ikki virkað í eitt longri samanhangandi tíðarskeið.

Hóast mælt verður til inklusjón í størst møguligan mun, so mælir arbeiðsbólkurin til, at serskúlin og teir serflokkar, ið nevndir eru, vera styrktir og mentir til veruliga at veita dygdargóð menningar- og lærutilboð. Eisini verður mælt til, at tey leggja seg eftir einum/nøkrum serøkjum, sum tey hvør sær kunnu menna, og sum tørvur er á. Mælt verður eisini til, at vesturøkið og Suðuroy fáa hvør sín serflokk.

Tilmælið leggur áherðslu á, at skilmarkað verður, nær talan er um ein bólk av næmingum, sum er grundað á eina samskipan av tímum til serligan tørv, og einum serflokki, har talan er um eina serliga skipan, *sum* virkar í eitt longri tíðarskeið, sí s. 22.

Mælt verður til, at bygnaðurin av serflokkum og serskúla verður skipaður soleiðis:




*Talva 6*




*Talva 7*

Í alt ganga 6898 næmingar í føroyska fólkaskúlanum, so sostatt ganga skúlaárið 2013/2014 1,5% av øllum næmingunum í serflokki, 0,72% í serskúlanum, og samlað uttanfyri almennu skúlaskipanini 2,23%. Hetta tal má sigast at vera ógvuliga lágt, um vit sammeta okkum við okkara grannalond, sí talvu [22].







*Talva 8*[23]

[22] Tølini í grannalondunum skulu takast við fyrivarni, tí ymiskar uppgerðir vísa ymisk tøl, og hartil eru ikki allar uppgerðir frá sama árstali, men tølini kunnu brúkast til at geva eina ábending um støðuna.

[23] "Serlig fyriskipan" merkir her, at tað bæði eru tey, sum ganga í serskúla, serflokki og sum fáa tímar vegna serligan tørv í fólkaskúlanum.

Serflokkar skulu skipast undir leiðslu av skúlastjóranum, men kunnu eisini vera skipað eftir serskúlalógini og tískil hoyra undir Skúlanum á Trøðni. Mælt verður til, at leiðslutíðin verður roknað eftir starvsfólkatalinum í skúlanum. Øll starvsfólk, sum hava meira enn 10 tímar um vikuna, skulu telja við í leiðslutíðini ella skúlaleiðslur fáa leiðslutíð tillutaða afturat í mun til tímatalið vegna serligan tørv, bæði lærara- og stuðulstímar [24]. Viðvíkjandi játtanini til serflokkar, so verður mælt til, at teir fáa tímajáttan til ein flokk, sum tilskilað í talvuni niðanfyri. Minsta kravið fyri at kallast ein serflokkur er 4 næmingar. Sum dømi kann nevnast, at um 4 - 12 næmingar eru í flokkinum, verður tað roknað sum ein flokkur, og millum 13 – 24 næmingar verður játtanin sum til tveir flokkar. Tað, sum kemur afturat hesari játtan, eigur at vera veitt frá Sernámi sum tímar vegna serligan tørv og verður veitt alt eftir, hvønn serligan tørv hjá teimum einstøku næmingunum í serflokkinum talan er um. Næmingatalið er avgerandi fyri, hvussu nógv starvsfólk eru knýtt at flokkunum, meðan serligi tørvurin hjá teimum einstøku næmingunum, og tann serligi tørvurin, ið flokkurin er skipaður eftir, er avgerandi fyri, um talan er um flokk á 1. 2. 3. ella 4. stigi. Mælt verður til, at slík stigatalva ella tørvsgreiningarfrymil verður gjørdur, tá ið tímar vegna serligan tørv verða tillutaðir. Dømi um, hvussu starvsfólkasamansetingin í ymiskum serflokkum kundi sæð út, er tilskilað í talvuni niðanfyri.

| | **A**<br>**4-7 næmingar** | **B**<br>**8-12 næmingar** | **C**<br>**13-18**<br>**Næmingar** | **D**<br>**19-24**<br>**Næmingar** |
|---|---|---|---|---|
| **1** | 1 lærari<br>1 stuðul | 1 lærari<br>2 stuðlar | 2 lærarar<br>2 stuðlar | 2 lærarar<br>3 stuðlar |
| **2** | 2 lærarar<br>1 stuðul | 2 lærarar<br>2 stuðlar | 3 lærarar<br>2 stuðlar | 3 lærarar<br>3 stuðlar |
| **3** | 1 lærari<br>2 stuðlar | 2 lærarar<br>2 stuðlar | 2 lærarar<br>3 stuðlar | 2 lærarar<br>4 stuðlar |
| **4** | 2 lærarar<br>2 stuðlar | 3 lærarar<br>3 stuðlar | 3 lærarar<br>4 stuðlar | |

*Talva 9*

Mælt verður til, at flokkar skulu verða ætlaðir ávísum serligum tørvi. Um tað námsfrøðiliga er ráðiligt, kunnu flokkar tillagast til fleiri serligar tørvir. Hetta verður eftir tilmæli frá leiðslu skúlans og Sernámi.

Til ber at ganga lutvíst ella heilt í serflokki. Tað er altíð lærari í serflokkinum, sum er flokslærari hjá næmingunum, ið eru tilknýttir serflokkin meira enn 10 t/v.

Allir næmingar í serflokkum hava tilknýti til ein annan ávísan flokk í skúlanum.

[24] Sí tilmæli um námsfrøðiligar stuðlar, juni 2013.

Serflokkar verða avtiknir aftur, um næmingatalið fer niður um lægstu flokking sambært flokkingartalvu.

Serflokkar verða skipaðir í samráð við Mentamálaráðið og Sernám. Serflokkar eiga at fevna um størri øki enn sjálvt skúla- /kommunuøkið, um hetta letur seg gera hølisliga.

Serflokkar skulu fevna um næmingar í fólkaskúlaaldri, ið ikki fáa nøktandi undirvísing og avbjóðingar í sínum heimaflokkum. Næmingar skulu tó kunna hava tilknýti til heimaflokkin í tann mun, tað letur seg gera.

Næmingur kann bert vera fluttur í serflokk í samráð við og eftir tilmæli frá Sernámi og foreldrum/avarðandi. Lærarar í serflokkinum gera undirvísingar- og menningarætlan fyri næmingin seinast tveir mánaðir eftir, at næmingurin er byrjaður í serflokki. Læruætlanir skulu eftirmetast hálvárliga. Hvør næmingur (og foreldur/avarðandi) hevur eitt kontaktfólk.

Arbeiðsinnihaldið í serflokkunum er grundað á fólkaskúlalógina og námsætlanir. Næmingarnir í serflokkunum hava sama tímatal sum tilsvarandi aldursbólkur, tó hevur skúlaleiðarin møguleika at søkja landsstýrismannin um frávik[25], um mett verður, at hetta er næminganna besta.

Skúlastjórin er ovasti leiðari við setanarmyndugleika og hevur ábyrgdina av serflokkinum, meðan flokslærarin hevur undirvísingarligu ábyrgdina og er toymisleiðari fyri toymið, sum er um flokkin. Fakliga samansetingin av starvsfólkunum skal umhugsast og grundgevast neyvt við støði í fakliga tørvinum hjá næmingunum í serflokkinum og innihaldinum í sertilboðnum. Miðað eigur at vera ímóti at hava ein støðugan starvsfólkahóp.

Sernám er ráðgevandi eindin og skal hava yvirlit og innlit í, hvat sertilboðini fevna um. Mælt verður til, at Skúlin á Trøðni kann verða knýttur at serflokkunum og virka sum ráðgevi. Eisini verður mælt til, at serflokkar og Skúlin á Trøðni veita kveiking, hugskot og vitanardeiling ímillum sín.

Bólkurin metir, at førleikastovan skal uppraðfestast við einum ávísum lykli, tá ið serflokkar verða stovnsettar.

Mælt verður til, at tað verður lýst í kunngerð reglur fyri serflokkar. Her skal greitt tilskilast, nær skúlin/skúlaøkið kann seta serflokk á stovn, og hvussu skipanin við næmingum tvørturum kommunumark skal skipast. Annað, sum eigur at tilskilast, eru treytir fyri stovnsetan, tørv, málbólk, innihald, høliskrøv og annað. Upptøkunevnd eigur at vera fyri hvønn serflokk, umboðandi skúlan og Sernám.

[25] Fólkaskúlalógin § 19, stk. 6

### 4.3.2 FRÁFARINGARPRÓGV

Hugsað eigur eisini at vera um fráfaringarprógv, tá ið næmingar við serligum tørvi umræður. Havast skal í huga, at ikki allir næmingar eru førir fyri at fara upp til próvtøkur, heldur ikki til próvtøku eftir serstakari fyriskipan, og harvið fáa ikki øll, sum nú er, eitt vanligt fráfaringarprógv. Sbrt. kunngerð[26] um próvtøkur fólkaskúlans er ásett, at skúlastjórin skrivar næmingi, sum ikki megnar fakligu krøvini í einari lærugrein, og tí verður frítikin fyri at fara til próvtøku, støðumetingarskjal. Ásett er, at skúlastjórin tekur í samráð við avvarðandi lærara, næmingin og tey, ið hava foreldramyndugleikan, avgerð um, hvat støðumetingarskjalið skal fevna um í mun til úrtøku og avrik næmingsins. Ásett er eisini í kunngerðini, at Mentamálaráðið ger frymil til støðumetingarskjal. Arbeiðsbólkurin tekur undir við hesi áseting í kunngerðini, men mælir tó til, at Mentamálaráðið setir bólk við lærarum, sum vanliga arbeiða við hesum næmingum, at veita ráð, hvussu ásetingarnar í hesi kunngerð á bestan hátt vera íverksettar. M.a. er tørvur á at endurskoða støðumetingarskjalið, so at hetta verður eins fyri allar næmingar, sum ikki fáa talmett prógv. Hesin ráðgevandi bólkur átti eisini at ráðgivið, hvussu ásetingarnar í somu kunngerð um próvtøku eftir serligari fyriskipan á bestan hátt verður fyriskipað. Samanumtikið metir arbeiðsbólkurin, at tað hevur alstóran týdning, at øll fáa eitt prógv/skjal, sum lýsir teirra førleikar, hvat innihaldið í skúlagongdini hevur verið, hvat næmingurin megnar, hvørjar førleikar viðkomandi næmingur hevur tilognað sær osfr.

### 4.3.3 SERSKÚLIN

Fólkaskúlin hevur ein serskúla, sum virkar eftir eini serstakari serskúlalóg.[27] Hetta er sostatt ein sjálvstøðugur almennur serskúli, við skúlastjóra, sum Mentamálaráðið setir. Í skúlanum ganga vanliga um 50 næmingar, og í løtuni eru 47 næmingar býttir í 12 flokkar. 17 gentur og 30 dreingir.

Endamálið við Skúlanum á Trøðni er at tryggja næmingum við serligum tørvi, at tey, ið ikki fáa nøktandi tilboð í vanligu undirvísingini ella serflokkum, fáa eitt tilboð[28], sum "tekur støði í fortreytum næmingsins"[29]. Skúlin á Trøðni er eitt heiltíðartilboð, umframt skúlan so varða tey eisini av skúlaheiminum.

Skúlin á Trøðni skal samskipa virksemið við vanliga fólkaskúlavirksemið so væl sum gjørligt. Í teimum førum, har tað er møguligt, eigur at miðast ímóti, at næmingurin kann fáa partvíst ella heilt fráfaringarprógv. Tó má hetta altíð verða í mun til endamálið, sum er at menna næmingin í mun til egnar fortreytir. Sbrt. serskúlalógini verða læruætlanir gjørdar til hvønn einstakan næming.

---

[26] kunngerð nr. 15 frá 28. februar 2013 um próvtøkur fólkaskúlans §§§§9, 21, 53 og 62.

[27] Løgtingslóg nr. 50 frá 9. mai 2005 um serskúla

[28] Løgtingslóg nr. 50 frá 9. mai 2005 um serskúla, § 2

[29] Løgtingslóg nr. 50 frá 9. mai 2005 um serskúla, § 5, stk. 2

Serskúlin er fyri næmingar í 7-18 ára aldri, tó við møguleika at halda fram til 21 ár. Bólkurin mælir til at halda á við møguleikanum, at næmingar kunnu ganga, til teir eru 21 ár, men mett verður, at tað er rímiligt, at Almannamálaráðið ber ein part av hesum kostnaði, tí tað er málsøkið hjá Almannaráðnum at seta á stovn viðkomandi tilboð til hesar næmingar aftaná lokna skúlagongd.

Serskúlin hevur tørv á og eigur at hava javnbjóðis rætt til vegleiðing og ráðgeving frá Sernámi eins og vanligi fólkaskúlin. Mælt verður til, at eitt samstarvstoymi verður knýtt at serskúlanum.

Mælt verður til, at grundgevast skal fakliga fyri eini setan. Rætta starvsfólkið skal veljast við førleikum og útbúgving sum grundgeving; Tað er samlaði tørvurin hjá flokkinum, men eisini atlitið at tí einstaka næminginum, ið skal avgera, hvat starvsfólk ella hvør starvsfólkahópur er tann rætti at røkja tørvin og menna næmingin.

Mælt verður til, at serskúlalógin verður endurskoðað og tillagað. Hugsað verður serliga um §5, stk. 3: Lærari ger hesa læruætlan í samráð við foreldur ella verja, so at hon er liður í eini heildarætlan fyri barnið.

## 5.0 FÍGGJARLIGU AVLEIÐINGARNAR AV ÁTØKUNUM

### 5.1 GONGDIN Í SERNÁMSFRØÐILIGU JÁTTANINI OG VERANDI JÁTTAN

Játtanin samlað til tað sernámsfrøðiliga økið í fólkaskúlahøpi er fíggjarárið 2014 umleið 88 mió. kr. Ein partur av tænastunum frá Sernámi og tænastueindunum fara til dagstovnaøkið, so tær 15,5 mió., sum eru játtaðar Sernámi og tænastueindunum fara bæði til dagstovnaøkið og fólkaskúlaøkið, so samlaða játtanin til serøkið innan fólkaskúlaøkið er nakað minni. Helvtin av játtanin til førleikastovur er tald við, tí tað sernámsfrøðiliga virksemið í førleikastovunum verður roknað sum tann eina grundsúlan í virkseminum har og svarar til umleið 50% av samlaða virkseminum í førleikastovuni. Ein partur av játtanini til stuðul til lesi- og skriviveik fer til næmingar, sum eru eldri enn fólkaskúlaaldur. Samlaða játtanin til fólkaskúlan er áleið 285 mió, umframt uml. 63 mió. til sernámsfrøðiligt virksemi, sum ikki fer av fólkaskúlajáttanini[30].

Í alt til fólkaskúlan við tí sernámsfrøðiligu játtanini er játtanin 348 mió. Av hesum tali verða umleið 25% nýtt til tað sernámsfrøðiliga økið[31].

| **Játtan 2014 Sernámsfrøðiligt virksemi** | **R 2009** | **R 2010** | **R 2011** | **R 2012** | **R 2013** | **J 2014** |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Miðfirra játtan til fyribyrgjandi serundirvísing | 14.000 | 17.000 | 16.000 | 15.000 | 15.000 | 15.000 |
| Førleikastovan[32] | 0 | 0 | 0 | 1.500 | 1.500 | 2.500 |
| Sertilboð í Venjingarskúlanum | 520 | 1.322 | 1.512 | 2.142 | 3.046 | 3.500 |
| Játtan til stuðul til lesi- og skriviveik | 600 | 600 | 600 | 968 | 974 | 1.374 |
| Sernám | 8.505 | 7.566 | 7.930 | 8.302 | 7.663 | 7.967 |
| Sernámsfrøðiligt virksemi í fólkaskúlanum | 34.783 | 34.330 | 35.309 | 35.309 | 35.444 | 35.436 |
| Sernámsfrøðiligar tænastueindir | 3.339 | 4.529 | 4.906 | 4.906 | 7.111 | 7.585 |
| Skúlin á Trøðni | 10.375 | 11.835 | 11.991 | 11.991 | 11.663 | 12.249 |
| Næmingaheimið | 2.800 | 2.800 | 2.800 | 2.800 | 2.800 | 2.800 |
| **Í alt** | **74.922** | **79.982** | **81.048** | **82.918** | **85.201** | **88.411** |

*Talva 10*

[30] Stuðul til lesi- og skriviveik er ikki við og ikki næmingaheimið. Miðfirraða játtanin, førleikastovan og sertilboðið í Venjingarskúlanum er partur av fólkaskúlajáttanini.

[31] Tøl yvir nýtslu til sernámsfrøðiliga økið í øðrum londum eru torfør at samanbera við, tí skipanirnar eru so ymiskar.

[32] Hetta er helvtin av játtanin til førleikastovur, tí tað sernámsfrøðiliga virksemið í førleikastovunum verður roknað til umleið 50% av samlaða virkseminum í førleikastovuni

Útfrá talvuni sæst, at játtanin til sernámsfrøðiliga økið hevur verið rættiliga støðugt.[33] Hinvegin kann staðfestast, at næmingar, sum fáa tímar vegna serligan tørv játtaðir frá Sernámi, gerast fleiri og fleiri. Sí talvuna:




*Talva 11*

## 5.2 FÍGGJARLIGAR AVLEIÐINGAR AV TILMÆLUNUM

Fleiri av tilmælunum, sum arbeiðsbólkurin mælir til, viðføra umraðfestingar av játtanini til sernámsfrøðiliga økið.

Arbeiðsbólkurin mælir til, at serflokkar fáa tímajáttan sum ein flokkur, um næmingatalið er millum 4-12, sum 2 flokkar um næmingatalið er millum 13 – 24 næmingar og so framvegis. Tað, sum kemur afturat hesari játtan, eigur at vera veitt frá Sernámi sum tímar vegna serligan tørv og verður veitt alt eftir, hvønn serligan tørv hjá teimum einstøku næmingunum í serflokkinum talan er um.

Við hesi skipan verður talan um eina fasta játtan til serflokkar, sum mælt verður til fer av fólkaskúlajáttanini. Mælt verður til, at ment verður ein stigaskipan at nýta, tá ið hesir tímar vegna serligan tørv vera tillutaðir. Henda umskipan kemur ivaleyst at viðføra eina samlaða økta játtan svarandi til, hvussu nógvir serflokkar vera.

Tó, sum nú er, verður sertilboðið í Venjingarskúlanum goldið umvegis fólkaskúlajáttanina, men mælt verður til, at sertilboðið har verður normerað til  flokkar, og at tímar vegna serligan tørv vera veittir frá Sernámi til hetta endamálið. Fíggjarliga avleiðing er, at støða má takast til, hvussu verandi játtan verður býtt.

Umleið 1,4 mió. verður veitt til lesi- og skriviveik. Henda játtan liggur uttanfyri

[33] Prístalsreguleringar o.a. er ikki tikið við í hesum útrokningum. Tølini eru tikin beinleiðis úr fíggjarlógini. Játtanin til førleikastovur er umroknað í miðal útfrá tímum játtaðir í virksemisætlanini til endamálið.

fólkaskúlajáttanina og verður nýtt til undirvísing í felagnum fyri lesi- og skriviveik. Mælt verður til, at játtanin, sum fer til hetta virksemið, verður samskipað við Sernám og skúlaøkið.

Mælt verður til, at so nógv sum tilber verður veitt til sernámsfrøðiliga økið í fólkaskúlahøpi sum miðfirrað játtan, so at skúlarnir/skúlaeindirnar sjálvar kunnu skipa tímarnar. Tó er neyðugt eisini at hava játtan til serligan tørv veittur eftir §12, stk. 2 í fólkaskúlalógini. Sum lýst er, verða uml. 25% av samlaðu játtanini til fólkaskúlan, tá er Sernám og skúlin á Trøðni talt við, nýtt til sernámsfrøðiligt virksemi. Um so er, at økt játtan verður til sernámsfrøðiliga økið og miðfirraða játtanin t.d. fer frá 13% til 18%, hetta svarar áleið til 5 mió. kr., sum hevði ført við sær, at prosentparturin til sernámsfrøðiligt virksemi í fólkaskúlanum varð økt til umleið 27% av samlaðu játtanini til fólkaskúlan.

Nýtslan til heima- og sjúkraundirvísing er ikki tald við í samlaðu nýtsluni til sernámsfrøðiliga økið. Henda nýtsla er ikki altíð tann sama, men verður lagað til eftir tørvi. Tó er nýtslan støðugt økt til hetta endamálið, og mett verður, at hetta árið verður nýtt umleið 1 mió. til hetta endamálið. Mælt verður til, at skipanin verður endurskoðað við tí fyri eygað at menna undirvísingina til henda málbólk og at samskipa og gangnnýta nýtsluna betur.

Viðvíkandi tænastueindunum verður mælt til, at deildarleiðarastørvini verða niðurløgd, og at tænastueindirnar vera umskipaðar í samstarvstoymi eftir ávísum býtislykli roknað eftir næmingatalinum/barnatalinum í økinum. Henda broyting viðførir, at játtanin skal tillagast, soleiðis at hon endurspeglar næmingatalið/barnatalið í økinum.

Ein uppraðfesting av samstarvstoymunum, bæði í normering og víðkan av økjum t.d. í Vesturøkinum og Sandoynni, krevur, at mann annaðhvørt javnar samansetingina út í teimum ymsu samstarvstoymunum kring landið, har skipanir eru, soleiðis at starvsfólkaorkan verður regulerað eftir uppskotna býtislykli, ella at ein økt játtan verður raðfest til samstarvstoymini.

Mælt verður eisini til, at møguligar tænastur, sum Sernám røkir í dag, sum kunnu og/ella eiga at vera veittar frá øðrum stovnum/ráðum, verða endurskoðaðar. Virksemið hjá Sernámi til børn undir skúlaaldur eigur at vera betur samskipað við kommunurnar. Eisini eigur at vera endurskoðað fíggingin av tænastum, sum Sernám tekur sær av, men sum eru málsøki hjá øðrum stovnum.

Eftirspurningur og væntanir til tímar og tænastur frá Sernámi økist støðugt, og fyri at tálma hesa gongd, verður mælt til, at neyvt og tilvitað samstarv og ábyrgdar- og uppgávubýtið er millum førleikastovur og Sernám.

# 6.0 KUNNGERÐAR OG LÓGARBROYTINGAR

## 6.1 LÓGARHEIMILDIR

Alt virksemið innanfyri tað sernámsfrøðiliga økið í fólkaskúlanum er heimilað í nøkrum fáum ásetingum í fólkaskúlalógini. Mælt verður til, at lógargrundarlagið verður eftirkannað, og at kunngerðir fyri økið verða gjørdar.

Eisini verður mælt til í endurskoðanini av lógarverkinum viðvíkjandi tí sernámsfrøðiliga økinum, at ásetingarnar í grein 24 í ST-sátttmálanum um rættindi hjá teimum, sum bera brek, verða lýstar og møguliga tiknar við í hesi endurskoðan.

Í stóran mun kann spurningur setast við heimildina, um tað annars umfatandi og samansetta sernámsfrøðiliga økið verður skipað í kunngerðum við heimild í verandi fólkaskúlalóg § 4, stk. 5, sbr. stk. 7. Kunngerðir eru fyrisitingarligar reglur, hvørs løgfrøðiliga gildi altíð skal hava heimild í demokratiskt samtyktari lóggávu. Í § 4, stk. 5 og stk. 6 er ásett, at sernámsfrøðilig ráðgeving verður veitt skúlum, foreldrum og øðrum, ið varða av næmingum í fólkaskúlanum. Næmingar, ið hava tørv á serligum tiltøkum, ella sum ikki fáa nøktandi úrslit í vanliga undirvísingartilboði skúlans, fáa serundirvísing og/ella sernámsfrøðiligan stuðul. Landsstýrismaðurin kann veita børnum, ið enn ikki hava byrjað skúlagongdina, sernámsfrøðiligan stuðul. Somuleiðis verður sernámsfrøðilig ráðgeving veitt foreldrum og øðrum, ið varða av hesum børnum. Í stk. 7 er tilskilað kunngerðarheimild til stk. 5. Mælt verður til, at henda kunngerð verður gjørd. M.a. áttu arbeiðsuppgávurnar viðv. kanning, ráðgeving, vegleiðing, undirvísing og aðrar námsfrøðiligar stuðulsuppgávur at verið tilskilaðar í kunngerð[34]. Hetta krevur allarhelst lógarbroyting, tí kunngerðin fer at vera umfatandi í mun til lógarheimildina, og sostatt kann ivi sáast um, hvørt slíkar reguleringar viðvíkjandi kanning, ráðgeving, vegleiðing, undirvísing v.m. fella innan fyri karmarnar av § 4, stk. 5, sbrt. stk. 7 í galdandi fólkaskúlalóg.

Førleikastovurnar, sum byrjaðu at virka í skúlunum í august 2012, eru ikki nevndar í fólkaskúlalógini. Mælt verður til, at førleikastovur verða viðgjørdar og allýstar við uppgávu- og ábyrgdarbýti í eftirkanningini av fólkaskúlalógini, har hugsað verður um kunngerðarheimild fyri hesar. Støða eigur at takast til, undir hvørjari grein kunngerðarheimild til hesar skal vera.

Í §12, stk. 2 í fólkaskúlalógini er ásett, at serundirvísing og sernámsfrøðiligur stuðul, ið ikki er fyribils, skal verða grundað á eina námsfrøðiliga/sálarfrøðiliga kanning, og skal fara fram í samráð við næmingin og foreldrini. Í hesum sambandi verður mælt til, at greinin verður eftirkannað, og t.d. ein vegleiðing verður gjørd, sum allýsir, hvat ein námsfrøðilig/sálarfrøðing kanning skal innihalda, og hvør ítøkiliga skal gera kanningina[35].

[34] Treytað av greiðari lógarheimild evt. í samstarvi við Dátueftirlitið viðv. innheinting og varðveitslu av persónsupplýsingum, ið standast av kanningunum.

[35] Her kann persónsupplýsingarlógin og Dátueftirlitið vera viðkomandi.

Mælt verður til, at broytingar vera gjørdar í fólkaskúlalógini, soleiðis at heimild verður at áseta, at allir næmingar, sum fáa tímar vegna serligan tørv, skulu hava einstaklings læruætlan.

Mælt verður til at kanna eftir, um neyðugt er at endurskoða §13, stk. 5, sum sigur, at næmingarnir skulu á øllum floksstigum verða undirvístir í sínum flokki størsta partin av undirvísingartíðini og kunnu í mesta lagi helvtina av samlaðu undirvísingartíðini verða undirvístir í skipaðum bólkum uttan fyri flokkin í mun til § 45, stk. 6.

Mælt verður til, at §§ 26 og 27 í fólkaskúlalógini verða eftirkannaðar við atliti at skipan av sernámsfrøðiligum tiltøkum tvørturum kommunumark og avmarkingum og møguleikum at skipa fyri sertilboðnum.

Tímar til heima- og sjúkraundirvísing verða, sum nú er, veittir til næmingar grundað á § 28. Mælt verður til at endurskoða § 28 um heima- og sjúkraundirvísing, og at kunngerðarheimild verður til hesa grein, soleiðis at reglur viðvíkjandi heima- og sjúkraundirvísing verða gjørdar neyvari.

Í sambandi við serflokkar verður mælt til, at hetta týðiligari verður orðað í fólkaskúlalógini við kunngerðarheimild, sum neyvt skal tilskila endamálið, innihaldið, upptøkumannagongdirnar, hølisviðurskiftini, krøv til stovnsetan av serflokki, atgongd til servitan o.a. Í § 45, stk. 4 er ásett, at næmingar, ið hava atferðar-, tilknýtis- og trivnaðartrupulleikar kunnu eftir avgerð skúlaleiðarans verða fluttir í aðrar skúlar í kommununi ella í annað undirvísingartilboð. Mælt verður til, at henda grein við eftirkanning og møguliga umorðing og ískoytum verður nýtt, tá ið næmingar skulu flyta tvørtur um kommunumark. Stk. 6 í somu grein heimilar landsstýrismanninum at seta á stovn serligan skúla ella undirvísingartilboð fyri næmingar við atferðar-, tilknýtis- og trivnaðartrupulleikum, ið ikki á annan hátt kunnu fáa nøktandi undirvísing í fólkaskúlanum. Henda grein heimilar stovnsetan av serflokkum og serskúlum, men mælt verður til at eftirkanna greinina og møguliga umorða greinina, soleiðis at hon fatar um breiðari og annan serligan tørv enn tað, sum er tilskilað. Eisini verður mælt til kunngerðarheimild til hesa grein.

Mælt verður til at lýsa samband millum fólkaskúlalógina og serskúlalógina í mun til sertilboð sbrt. § 45.

Mælt verður til, at serskúlalógin, sum Skúlin á Trøðni virkar eftir, verður eftirkannað. M.a. verður mælt til, at § 5, stk. 3 verður umorðað, soleiðis at lærari ger læruætlan í samráð við avvarðandi.

## 7.0 SAMANUMTØKA

Arbeiðið hevur tikið støðið í teimum 5 arbeiðssetningunum og er skipað í 5 pørtum, har tilmælini eru skipað undir hvørjum parti sær. Burturúr er komið tilmæli um 29 minni og størri átøk. Tað, sum fyllir mest í hesum tilmæli, er at fáa endurskoðað lóggávuna, sum viðvíkur tí sernámsfrøðiliga økinum. Tilmælið mælir til, at ST-sáttmálin um rættindi hjá teimum, ið bera brek, verður viðhugsaður í endurskoðanini av lóggávuni, men at vit eiga at umhugsa gjølla, hvussu vit hava og eiga at íverkseta inklusjónshugtakið við atliti at tí føroyska samfelagnum og tí serstøku føroysku skúlamentanini. Lutfalsliga nógvir næmingar ganga í tí vanligu skúlaskipanini, meðan bert 0,72% av næmingunum ganga í serskúla. Hetta setur stór krøv til at skipa tað sernámsfrøðiliga økið í fólkaskúlanum, og tískil er alneyðugt, at førleikastovur og Sernám arbeiða neyvt saman við einum greiðum uppgávu- og ábyrgdarbýti, soleiðis at tað fakliga og fíggjarliga tilfeingið verður gagnnýtt á bestan hátt næmingunum at frama. Viðvíkjandi ábyrgdar- og uppgávubýtinum millum Sernám og skúlan/førleikastovur verður mælt til, at hetta verður neyvt allýst. Mælt verður til, at Sernám verður skipað í leiðslutoymi, greiningartoymi og samstarvstoymi, sum eru umboðað javnt í Føroyum eftir einum ávísum býtislykli, soleiðis at tann fakliga starvsfólkaorkan verður tryggjað í jøvnum býti millum økini. Tænastueindirnar verða umskipaðar til hesi samstarvstoymi, sum antin kunnu vera staðsett í verandi tænastueindum ella í skúlunum.

Tilmælið er um at styrkja og økja um serflokkar í skúlunum og at fáa neyvari ásetingar viðvíkjandi hesum serflokkum. Mælt verður til at endurskoða játtanina bæði í mun til fasta játtan, men eisini at menna eina tørvsgreining ella stigaskipan, sum ásetir, hvønn serligan tørv talan er um, og hvussu nógvan stuðul tørvur er á. Mælt verður til, at Skúlin á Trøðni og serflokkar verða tættari knýttir at hvørjum øðrum. Tilmælið er eisini at fáa eftirmetingarskjøl og próvtøku eftir serligari fyriskipan í fasta legu.

Hetta tilmælið snýr seg í fyrstu atløgu um tey innihaldsligu, løgfrøðiligu, fíggjarligu og bygnaðarligu viðurskifti, sum skapa grundarlag fyri, at farast kann undir at skipa sernámsfrøðiliga økið betur. Umráðandi er at leggja sær í geyma, at skipanirnar eru onki uttan tey fólk, sum starvast har, og at tilmælið sigur lítið um tey menniskjaligu atlitini, sum hava avgerandi týdning fyri eina tilgongd. Tilmælið hevur sum so ikki nomið við fakligar førleikar og um at uppstiga og møguliga at málrætta rekruteringina av fakligum førleika. Tó tað hevur stóran týdning at vera tilvitaður um, at krumtappurin í eini vælvirkandi sernámsfrøðiligar skipan eru fakfólkini og tað menniskjaliga tilfeingi.

Ynskið um batar á tí sernámsfrøðiliga økinum verður sett fram av mongum bæði uttanfyri og innanfyri ta sernámsfrøðiligu skipanina. Eisini hevur henda samgongan ásett í samgonguskjalinum, at tilboðini til børn við serligum tørvi skulu betrast, og at ítøkiligar menningarætlanir skulu gerast til næmingar við serligum tørvi. Arbeiðsbólkurin vónar, at ein raðfesting av tilmæltu átøkunum í hesum tilmæli verður viðgjørd, soleiðis at innan rímiliga tíð kunnu børn við serligum tørvi fáa ágóðan av hesum arbeiði.

Við hesum orðum leggur arbeiðsbólkurin tilmælini fram til støðutakan.

# 8.0 KELDUR


Dyssegaard, C. B., Larsen, M. S.,og Tiftikci, N. (2013) *Effekt og pædagogisk indsats ved inklusion af børn med særlige behov i grundskolen. Systematisk review*. København. Dansk Clearinghouse for Uddannelsesforskning, IUP, Aarhus Universitet.

Dyssegaard. C. B. & Larsen, M. S. (2013) *Viden om inklusion*. Dansk Clearingshouse for Uddannelsesforskning. Institut for Uddannelse og Pædagogik (DPU) Aarhus Universitet

Egelund, N. & Tetler, S. (2009). *Effekter af specialundervisningen. Pædagogiske vilkår i komplicerede læringssituationer og elevernes faglige, sociale og personlige resultater*. København: Danmarks Pædagogiske Universitetsforlag.

Fólkaskúlaráðið (2011). *Tilmæli um sernámsfrøði.*

Fólkaskúlaráðið (2012). *Upprit um førleikastovur - grundað á tilmælið um serundirvísing*

Fólkaskúlaráðið (2013) *Undersøgelse om læreres og skolelederes syn på og erfaringer med ressourcentre på skolerne.* Scharling Research

Implement consoulting group (2013). *Pejlemærker for fremtidens pædagogisk-psykologiske rådgivning.* KL

*Ískoytisspurningar til TALIS-kanningina* – spurningar, sum fólkaskúlaráðið setti um førleikastovur. Februar 2014

Kunngerð nr. 94 frá 22. Juni 2000 (broytt 6.mars 2001) um sernámsfrøðilingan stuðul til næmingar við likamligum ella sálarligum breki

Løgtingslóg nr. 125 frá 20. juni 1997 um Fólkaskúlan, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 34 frá 28. apríl 2009

Løgtingslóg nr. 50 frá 9. mai 2005 um serskúla

Løgtingslóg nr. 67 frá 10. mai 2000 um dagstovnar og dagrøkt

Mentamálaráðið (2001). *Tilmælið um sernámsfrøði.*

Mentamálaráðið (2005). *Tilmælið til landsstýrismannin um royndarverkætlan í Eysturoy.*

Mentamálaráðið (2013). *Tilmælið um námsfrøðiligar stuðlar í fólkaskúlanum.*

Nielsen, Bjarne. (2014). *PPR Håndbogen*. Dansk Psykologisk Forlag.

Undervisningsministeriet (2000) *Vejledning om PPR pædagogisk-psykologisk rådgivning*.

**Alnótin**

Nøkkeltall for grunnskolen t.o.m. skoleåret 2013/14. Faktaark 2014.1. Utdannings forbundet.
www.utdanningsforbundet.no

Specialundervisning 2012 – Statistikcentralen - Finnland
http://www.stat.fi/til/erop/2012/erop_2012_2013-06-12_tie_001_sv.html

Specialundervisning i folkeskolen - Danmark
http://www.kl.dk/ImageVaultFiles/id_42753/cf_202/Specialundervisning_i_folkeskolen_-_veje_til_en_be.PDF

Eleverne får i højere grad specialundervisning i udkanskommuner - Danmark
http://www.folkeskolen.dk/531986/eleverne-faar-i-hoejere-grad-specialundervisning-i-udkantskommuner

Specialundervisning og segregering 2012/13
http://www.uvm.dk/Service/Statistik/Statistik-om-folkeskolen-og-frie-skoler/Statistik-om-elever-i-folkeskolen-og-frie-skoler/

Elever med særlige behov i almenskolen: Inklusion, trivsel og selvværd. En kortfattet systematisk forskningskortlægning (05.06.2014)
http://edu.au.dk/fileadmin/edu/Forskning/Elever_med_saerlige_behov_i_almenskolen_Clearinghouse.pdf

## 9.0 FYLGISKJAL

### Fylgiskjal 1

| leiðslutoymi | greiningartoymi | samstarvstoymi | førleikastovan | førleikastovan og samstarvstoymið í felag |
|---|---|---|---|---|
| Staðseting: Sernám<br><br>Leiða og fordeila arbeiði í greiningar-<br>og samstarvstoyminum.<br><br>Leiða og fordeila arbeiði, umsita tímapuljuna og samskipa viðgerðina<br>av tímabýtunum.<br><br>Fyrisiting, journal, KT v.m. lønaravgreiða í sambandi við sernámsfrøðiligar stuðlar<br><br>Bókhald, Skrivarauppgávur<br>Føra hagtøl | Staðseting: Sernám<br><br>Tørvsgreiningar<br><br>Sálarfrøðiligar kanningar<br><br>Taluviðgerð<br><br>Rørslu- og sansaskipanar kanningar, ráðgeving og uppfylging<br><br>Hoyrikanningar, ráðgeving, uppfylging og undirvísing av næmingum við CI og øðrum hoyribrekum<br><br>IKT, kanning, ráðgeving og uppfylging til alternativt samskifti | Staðseting: skúlar ella annað stað í økinum<br><br>Sernámsfrøðilig ráðgeving<br><br>Supervisión, uppfylging<br><br>Miðfirrað serundirvísing, samskipað við serligan tørv<br><br>Vera við til at menna læruumhvørvið<br><br>Arbeiða fyri inklusjón<br><br>Ráðgeva skúlaleiðsluni, lærarum og foreldrum | Staðseting: skúlin<br><br>Er undir leiðslu skúlans<br><br>Samskipa tímar og innihald vegna serligan tørv og miðfirrað serundirvísing<br><br>Menna undirvísingarhættir<br><br>Faklig upplegg, foreldrafundum og námsfrøðiligum fundum<br><br>Gera lesi/roknikanningar<br><br>Tryggja, at einstaklings-læruætlanir verða gjørdar | Staðseting: skúlin<br><br>Einstaklinga fakligar royndir<br><br>Sparra og ráðgeva í tilgongdum hjá lærarum<br>Skipað arbeiðs- og mannagongdir<br><br>Ráðgeva og vegleiða lærarum og foreldrum<br><br>Stuðla arbeiðinum at skipa undirvísingina fyri næmingar við serligum tørvi<br><br>Uppfylging av niðurstøðum í sálarfrøðiligakanningum,<br>eygleiðingum, |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| Umsita og viðgera heima- og sjúkraumsóknir<br><br>Umsita samstarv og tryggja “brúgvarnar “ millum dagstovn, skúla, miðnám ella annað virksemi | Lesi-/orðblindakanning, vegleiðing og uppfylging | Neyvt samstarv við førleikastovuna<br><br>Einstaklingsætlanir, tillaging, lýsing, íverksetan og uppfylging<br><br>Stuðla arbeiðnum hjá førleikastovunum at skipa undirvísingina fyri børn við serligum tørvi<br><br>Uppfylging av niðurstøðum í sálarfrøðikanningum, eygleiðingum, førleikakanningum, lesi-kanningum, orðablinda-kanningum v.m. í tøttum samstarvi við avvarðandi fakfólk<br><br>Tryggja og hava eftirlit við, at næmingar verða regluliga lesikannaðir | fyri næmingar við serligum tørvi<br><br>Næmingalaga, ráðgeva og eftirmeta í mun til innihaldið í læru- og menningartilgongdini hjá næmingum við serligum tørvi, har undir ársætlan, og einstaklinga læruætlan<br><br>Ráðgeva og veita hjálp viðvíkjandi inklusjón<br><br>Tilfar evt. tillaga tilfar<br><br>Gera einstaklings fakligar royndir<br><br>Menna námsfrøðiliga umhvørvi í skúlunum at kunna og samskifta við foreldur | førleikakanningum, lesikanningum, orðablindakanningum v.m. í tøttum samstarvi við avvarðandi fakfólk |